# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*-Vit kunnu ikki geva Thaksin almenna móttøku, men vit fara at biðja hann um búskaparlig ráð*
*(teilendski fíggjarmálaráðharrin)*

# Hann skal í gálgan

**Í Irak hevur forsetaráðið staðfest, at Ali Hassan al-Majeed skal heingjast**

Ali Hassan al-Majeed er betur kendur undir navninum Kemiski Ali, tí tað var hann, sum skipaði fyri eiturgassálopinum á kurdarnar har norðuri í Irak í 1988, og sum kostaði umleið 180.000 mannalív.

Majeed varð tikin stutt eftir innrásina í Irak, og í juni í fjør varð hann dømdur til deyða fyri at hava havt ábyrgdina av hópmorðinum ímóti kurdunum.

Ætlanin var, at hann skuldi takast av døgum seinasta heyst, men tað vísti seg, at forsetaráðið var ikki sinnað til at staðfesta deyðadómin alt fyri eitt. Nú hevur ráðið, sum er mannað við forsetanum og teimum báðum varaforsetunum, so staðfest, at Kemiski Ali skal heingjast.



*Ali Hassan al-Majid var verjumálaráðharri hjá Saddam Hussein. Teir báðir vóru systkinabørn*

# Kuba staðfestir mannarættindi

**Avgerðin kann vera ein ábending um broyting í kubanska politikkinum**

Bara nakrar fárar dagar eftir at Fidel Castro formliga fór frá sum kubanskur forseti, hevur landið staðfest tveir ST-sáttmálar um mannarættindi. Politiskir eygleiðarar siga, at Fidel Castro var ímóti teimum báðum sáttmálunum, og tí kann avgerðin hjá eftirmonnum hansara vera eitt tekin um ein annan politikk, siga teir.

Felipe Roque, uttanríkisráðharri, sum skrivaði undir teir báðar sáttmálarnar, segði sambært BBC, at staðfestin hevur einki við valdsskiftið at gera, og at sáttmálarnir staðfesta rættindi, sum kubanar longu hava.

Politiskir eygleiðarar halda kortini ikki, at tilburðurin hevur so lítlan týdning, sum Felipe Roque vil gera hann til. Teir vísa á, at sambært sáttmálunum skal kubanska stýrið virða tali- og skrivifrælsið og rættindini hjá fólki at ferðast. Fleiri eygleiðarar vænta, at Kuba fer at lata sínar politisku fangar leysar um stutta tíð.

# Hesir ráða í Afghanistan

**Stjórnin og herurin hjá Hamid Karzai, forseta hava bara ræðið á 30 prosent av Afghanistan. Í hinum partinum ræður lógloysið**

Taliban hevur havt stóra framgongd í Afghanistan, og sambært leiðaranum á amerikanska fregnartænastustovninum, Michael McConnell, hevur rørslan nú fult eftirlit við 10 prosentum av landinum.

Seks ár eftir at USA gjørdi innrás í Afghanistan er støðan framvegis sera ótrygg. Lokalir krígsharrar hava ræðið á umleið 60 prosentum av landinum, Taliban ræður í 10 prosentum, og so hevur stjórnin tey seinastu7 30 prosentini, segði McConnell í einari hoyring í amerikanska Senatinum í gjár. Hann viðgekk, at arbeiðið at skipa Afghanistan sum eitt støðugt samfelag við Kabul sum høvuðsstaði hevur ikki gingið sum ætlað, og at støðan har suðuri í landinum bara versnar.

Tað var verjunevndin hjá Senatinum, sum vildi hava at vita, hvussu tað gongur í Afghanistan. Umframt Michael McDonnell hevði nevndin sent boð eftir Michael Maples, sum er ovasti fyri fregnartænastunum hjá amerikonsku hermegini. Hann greiddi frá, at pakistanskir og afghanskir myndugleikar megna ikki at forða fyri, at Taleban og al-Qaeda eru í ferð við at styrkja sína støðu á markinum millum Pakistan og Afghanistan.

- Viðurskiftini í Afghanistan eru versnað nógv tað seinasta árið, og nú er støðan so ring, sum ho0n ikki hevur verið, síðani Talibanstýrið fall á heysti í 2001, segði Michael Maples.



*Vápnað harkalið hava ræðið á 70 prosentum av Afghanistan, og støðan hevur ongantíð verið so ring sum nú, sigur amerikanska fregnartænastan*

(Mynd: AP)

## STUTT SAGT

### Yvirgangsmaður flýddur

Mas Selamat Kastari, sum sambært myndugleikunum í Singapore stóð á odda fyri einum yvirgangsbólki, flýddi í gjár úr varðhaldi sínum í Singapore. Myndugleikarnir vilja vera við, at Mas Selamat Kastari og bólkur hansara ætlaðu at ræna eitt ferðamannaflogfar og at stoyta tað niður á altjóða flogvøllin í Singapore. Atsóknina skuldu teir fremja sum hevnd fyri, at myndugleikarnir í Singapore søktu at yvirgangsfelagsskapinum Jemaah Islamiyah í 2001 og settu fleiri av limunum í fongsul. Í Indonesia vilja myndugleikarnir vera við, at Mas Selamat Kastari var við til at fyrireika bumbuatsóknina at Bali í 2002, har meiri enn 200 fólk doyðu.

### Kokain í fjøruni

Seinastu tíðina eru nógvir pakkar við rúsevninum kokain skolaðir upp á land í fjøruni í Cornwall í Onglandi. BBC veit at siga, at higartil eru umleið 50 kilo av kokaini rikin inn í fjøruna. Bretsku myndugleikarnir hava illgruna um, at eitt liberiskt farmaskip hevur mist rúsevnið fyri borð. Skipið sigldi fram við Cornwallstrondini, men sambært papirunum var tað fermt við bananum, sigur BBC. Bretska løgreglan sigur seg ikki vita, hvaðan kokainið stavar, men sigur, at málið verður kannað.

### Eingin Bloomberg

Tað hevur ljóðað allan vetur, at borgarstjórin í New York, Michael Bloomberg, fór at stilla upp til forsetavalið í heyst, men í gjár boðaði hann frá, at so verður ikki. Í grein í New York Times skrivar hann, at hann hevur roynt at lurta eftir sínum ráðgevum og stuðlum, og at hann er komin til ta niðurstøðu, at hann skal ikki stilla upp. Bloomberg hevur fyrr funnist at teimum, sum kappast um uppstillingina. Hann heldur, at tey leggja ov lítlan dent á búskap, umhvørvi og innflytarar.